# Ronaldo er kaldur

Cristiano Ronaldo sigur, at tað nervar hann als ikki, at fólk hata hann og rópa eftir honum til fótbóltsdystir. - Eg elski, tá fólk buh'a eftir mær. Eg elski at síggja hatrið í eygunum á teimum og hoyra tey svína meg til. Tað eru nógv fólk, sum hata meg, men enn fleiri, sum elska meg og stuðla mær, sigur Ronaldo við So Foot.




# Frem-amatør vórðu flongdir

Sáttmálaspælararnir hjá danska felagnum Frem – teirra millum Atli Danielsen og Jón Rói Jacobsen – vildu ikki spæla seinasta dystin í hesum kappingarárinum, tí teir ikki hava fingið løn frá felagnum. Tí mannaðu amatørar liðið hjá Frem sunnudagin. Og tað gekk, sum mann kundi væntað. Viborg vitjaði og vann heili 6-0.



# Firvaldur í góðum lag

*Firvaldur legði seg á odda tíðliga í róðrinum, og seinasta teinin móti málinum var eingin ivi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Samansetta manningin úr Surðuroy tók Jallin og øll onnur á bóli á Skálafjørðinum**

**KAPPRÓÐUR**

*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað ber til hjá suðuroyingum at røkka góðum úrslitum, tá ið tað verður arbeitt í felag. Fleiri dømi hava verið um hetta, og aftur leygardagin varð hetta undirstrikað.

Froðbiar Sóknar Róðrarfelag eigur Firvald. Á Norðoyastevnu bendi avrikið á, at úrslitini hjá gentunum kunnu fara at røkka langt í ár. Ta ferðina noyddist Firvaldur at lúta fyri Jallinum hjá Róðrarfelagnum Knørri.

Á Skála vóru leiklutirnir býttir um. Firvaldur legði seg beinanvegin væl fyri, og í endaspurtinum var eingin ivi. Firvaldur var meiri enn eina hálva bátslongd fremri enn Jallurin.

Tíðirnar boða frá, at eingin annar var við í kappingini um fremsta plássið. Hvassi, sum vann bronsukrónurnar, kom á mál meiri enn fjúrtan sekund aftanfyri Jallin.

Suðuroyarportalurin veit at siga, at fleiri bygdir í Suðuroy eru umboðaðar umborð á Firvaldi. Tvær av gentunum eru av Tvøroyri, tríggjar eru úr Hvalba, ein úr Fámjin og ein úr Vági.

Tá ið óføru kappróðrarmanningarnar vórðu móttiknar á Tvøroyri leygarkvøldið, helt formaðurin í Froðbiar Sóknar Róðrarfelag røðu:

– Hetta er ein stór løta fyri Froðbiar Sóknar Róðrarfelag, og at so nógv fólk geva kappróðrinum ans, fløvar, segði ein stoltur formaður í FSR, Niels Jacobsen, við Suðuroyarportalin.

# Eingin ger nakað við Erlu

**Kvinnurnar úr Fuglafirði endurtóku á Skála við sannførandi avrikið, sum tær framdu í fyrstu FM kappingini**

**KAPPRÓÐUR**

*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað var nakað heilt nýtt, tá ið Erla Kongsdóttir við kvinnumanning úr Fuglafirði næstsíðsta leygardag vann fyrsta FM kappróðurin, sum var í Klaksvík.

Á Skála varð undirstrikað, at í løtuni eiga fuglfirðingar bestu kvinnumanningina í 5-mannaførum, og harvið ber tað eftir tvær tær fyrstu FM kappingarnar ikki til at siga annað, enn at Erla Kongsdóttir er favorittur at vinna FM. Hetta heitið hevur Erla Kongsdóttir ongantíð vunnið, síðani tað í 1973 varð farið undir FM kappingina eftir tí leistinum, sum síðani hevur verið nýttur.

Tað skal leitast langt og leingi fyri at finna FM sigur til kvinnurnar í Fuglafirði. Í árunum frá 1964 og fram til 1972 varð tað í einum róðri eftir Ólavsøku kappast um FM. Í fyrstu kappingini, í 1964, vann Erla Kongsdóttir fyri fyrstu og higartil einastu ferð!

Komandi vikurnar fara at vísa, hvussu tað fer at tørna út í ár. Fyribils sær tað gott út hjá Erlu Kongsdóttir.

Á Norðoyastevnu vóru tað ávikavíst Frúgvin úr Miðvági og Hvassi av Oyri, sum bjóðaðu av og endaðu á næstfremsta og triðja plássi. Á Skála komu bátarnir á mál í júst somu røð.

Á Norðoyastevnu var munurin frá Erlu Kongsdóttir og aftur til Frúnna 1.07 sekund. Á Fjarðastevnu var munurin tódnaður niður í 0.56 sekund. Úrslitini og gongdin boða frá, at talan verður um sera spennandi kapping, tá ið eitt nýtt umfar verður á skránni í Kollafirði leygardagin.



*Erla Kongsdóttir vann FM í 1964, tá talan bert var um ólavsøkuróðurin. 45 ár seinni tykjast fuglfjarðakvinnurnar aftur skula fegnast um gullmerkini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## FM-kappróður

| | 5-mannafør, dreingir | Stig íalt | Fjarðastevna |
|---|---|---|---|
| 1 | Tjaldrið | 14 | 7 |
| 2 | Blikur | 10 | 5 |
| 3 | Junkarin | 10 | 4 |
| 4 | Teistin | 9 | 6 |
| 5 | Royndin Fríða | 7 | 3 |
| 7 | Kollur | 3 | 2 |
| 8 | Havfrúgvin | 3 | 1 |
| | **6-mannafør, kvinnur** | | |
| 1 | Gongurólvur | 14 | 7 |
| 2 | Páll Fangi | 11 | 6 |
| 3 | Sølmundur | 11 | 5 |
| 4 | Jarnbardur | 7 | 4 |
| 5 | Hvessingur | 7 | 3 |
| 6 | Romvlvs | 4 | 2 |
| | **5-mannafør, gentur** | | |
| 1 | Firvaldur | 13 | 7 |
| 2 | Jallurin | 13 | 6 |
| 3 | Hvassi | 7 | 5 |
| 4 | Sílið | 7 | 4 |
| 5 | Havfrúgvin | 8 | 3 |
| 6 | Falkur | 6 | 2 |
| 7 | Katla | 1 | 0 |
| | **5-mannafør, kvinnur** | | |
| 1 | Erla Kongsdóttir | 14 | 7 |
| 2 | Frúgvin | 12 | 6 |
| 3 | Hvassi | 10 | 5 |
| 4 | Ritan | 8 | 4 |
| 5 | Blikur | 6 | 3 |
| | **6-mannafør, menn** | | |
| 1 | Tvørabáturin | 13 | 7 |
| 2 | Riddarin | 13 | 6 |
| 3 | Smyril | 10 | 5 |
| 4 | Gongurólvur | 7 | 3 |
| 5 | Skúgvur | 5 | 2 |
| 6 | Sundabáturin | 4 | 4 |
| 7 | Rádni | 3 | 1 |
| 8 | Jarnbardur | 1 | 0 |
| | **8-mannafør** | | |
| 1 | Argjabáturin | 14 | 7 |
| 3 | Ørvur | 11 | 5 |
| 4 | Knørrur | 9 | 4 |
| 2 | Árnfirðingur | 6 | 6 |
| | **10-mannafør** | | |
| 1 | Eysturoyingur | 14 | 7 |
| 2 | Klaksvíkingur | 12 | 6 |
| 3 | Havnarbáturin | 10 | 5 |